NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Føðingar

6. juli fingu Vanja Hansen og Sigurd Davidsen, Hósvík, búsitandi í Aalborg, eina dóttur. Hon vigaði 3580 gr og var 52 cm long.

Ingunn og Tordis sita her við lítlabeiggjanum, sum er føddur 1. mars. Hann eitur Rólant eftir abbanum. Foreldrini eru Jastrid og Janus.

7. juli fingu Majbrit Gade og Djóni Strømsten, Sandavági, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3300 gr.

8. juli fingu Óluva og Jógvan Horn, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3700 gr.

8. juli fingu Erik og Gudny Heinesen, Bøur, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3600 gr.

8. juli fingu Katrin Lindberg og Rúni Hansen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3600 gr.

9. juli fingu Maiken Mortensen og Høgni í Jákupsstovu, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3900 gr.

9. juli fingu Christianna Joensen og Henrik Eskildsen ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4150 gr.

9. juli fingu Durita og Fróði Gregersen, Syðrugøtu, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4400 gr.

9. juli fingu Erla Heinesen Højsted og Osvald Olsen, Frederiksberg, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3000 gr.

10. juli fingu Iris Vesturlíð og Áki Justinussen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3400 gr.

10. juli fingu Lív Joensen og Kurt Rasmussen, Skála, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3300 gr.

10. juli fingu Srikanya Nandi og Aritranandi, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 2600 gr.

13. juli fingu Birgitte Allansdóttir Sørensen og Thomas Sørensen, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3900 gr.

13. juli fingu Elsebeth Vilhelm og Jóhan Christiansen, Leirvík, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4975 gr.

13. juli fingu Beinta Müller og Chris Harper, Vestmanna, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3250 gr.

14. juli fingu Anita Højgaard og Jóhan Weihe, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4000 gr.

14. juli fingu Anna Maria Kjærbæk og Pauli Danielsen, Miðvági, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3300 gr.

Edith Dahl 90 ár

Í dag verður mamma 90 ár. Mamma er ættað av Slættanesi, haðani hon hevur nógv góð minni, tó bert sum staðið, har hon plagdi at ferðast hjá ommuni og abbanum. Trý ára gomul fluttu tey til Sandavágs, og hennara fyrsta skúlaár gekk hon í "Bollanum", sum skúlin í Sandavági tá varð róptur. Hetta komst av, at her hevði verið fiskabollavirki, og væl minnist hon leivdirnar frá hesum virkseminum í skúlanum, m.a. komfýrin tey høvdu brúkt at kóka bollarnar á. Haðani fóru tey til Vestmanna, sum fyri hana er heimbygdin.

Fimtan ára gomul fór hon í húsið hjá mostrini í Havn at vera.

Frá fyrsta degi hevur hon trivist stak væl millum havnafólk, sum hon altíð hevur róst. Stuttligt er at hoyra hana siga frá sínum ungdómsárum í Havn, og hvussu nógvir møguleikar hon helt vera í Havn tá í tíðini!! Men, sum ein klókur maður segði - alt er relativt. Eitt var at ganga í S`ið, sum var í Quillingsgarði. Her gekk hon at læra "at seyma og taka mál" . Navnið komst av, at hesar tríggjar konurnar, sum lærdu frá sær seymikynstrið, allar itu Suffía. Eisini lærdi hon nógv av at vera í húsi hjá Zakariasi á Skipafelagnum og Birruni, sum hon varð so góð við, og har hon kom at vera, tá hon var seytjan.

Meðan hon tænti undir Pisuvarða, kom hon at kenna pápa okkara, sum tá stóð í handlinum hjá Hansi undir Kletti (Hans Joensen). Hann skuldi læra til "handilskommis", sum tað so fínt æt tá á døgum. Ja, fínt skal tað vera. At gerast krambakallur var ivaleyst ikki komið frá honum sjálvum, og tí varð honum skjótt greitt, at tað var heldur sjógvurin sum dró. Tá børnini komu, valdi hann at gerast heimamaður burturav, fekk starv á Telefonverkinum, sum síðan gjørdist lívsstarv hansara.

Í 1938 giftust tey inn hjá verforeldrum hennara í Dr. Jakobsensgøtu ella "Statsvejen", sum tað tá varð rópt. Seinni fluttu tey niðan í Bug, har umstøður vóru at fáast við træðarbrúk, sum tey bæði høvdu stóran áhuga fyri. Fyri okum fimm børnini, Heri, Hans Eli, Kristjan, Gisleyg og Katrina hevur tað verið spennandi bæði at vaksa upp niðri í Havnini og á trøðni, sum tá var í óbygdum - við kúgv, seyði, og flogfenaði av allahanda slagi.

Fyrst í sekstiárunum, tá børnini so smátt vóru við at koma undan, fór mamma á Bacalao at arbeiða. Eitt arbeiðspláss, sum hon hevur alt gott at bera, og sum hon sigur, veruliga var merkt av solidariteti ikki bara millum fólkið á gólvinum, men eisini mótvegis arbeiðsplássinum. Skjótt fór hon uppí fakfelagsarbeiði og sat í nevndini fyri Havnar Arbeiðskvinnufelag út við átjan ár. Sum sannførd javnaðarkona var størsta uppgávan fyri henni at virka fyri javnrættindum. Við Andreu Árting á odda megnaðu hesar røsku Havnar konur at vinna konufólki líka løn fyri líka arbeiði, sum sjálvt summar konur tá hildu vera ovboðið. Alt arbeiðið gjørdu tær sjálv-ar. Hetta yvirforbrúkið í tíð av sakførarum í samráðingum, heldur hon lítið um. Tað bara dýrkar og leingir um tilgongdina.

Vanligt vit og skil heldur hon vera munabesta samráðingaramboðið.

Nú Føroya Tele fekk til vega barnaansing, mintist hon aftur á, hvussu hesar somu fakfelagskonurnar royndu hetta sama fyri skjótt hálvari øld síðan. Allar arbeiddu tær á Bacalao uttan forkvinnan. Tá nógv arbeiði var á virkinum, sóu tær, hvussu tað ofta stóð á at fáa fólk. Harafturat løgu børnini hjá fiskafólkinum ofta endilang á bryggjuni og fiskaðu murtar og vóru til stóran ampa. Tí søktu tær kommununa um grundøki millum Bacalao og Hospitalið, sum tær hildu vera so mikið stór arbeiðspláss, at grundarlag var fyri barnagarði til hesi. Tó varð hetta av ongum.

Nú hon fyllir níti, og vit sita og líta aftur um bak, renna fram nógv góð og rík minni. Hon hevur verið røsk, arbeiðssom og mest av øllum hevur hennara glaða lyndi mangan verið til lætta og eggjan hjá teimum, hon hevur verið saman við. Tó hevur heldur ikki hon verið spard fyri stóra sorg. Bert fimm ár eftir at pápi okkara doyði, mistu vit Kristjan, yngsta beiggja okkara. Tann sorgin nívur dagliga. Tó enn fevnir hon víða, eisini um síni sekstan ommu- og átjan langommubørn. Fylgir væl við í tí, sum fyriferst í samfelagnum, og kemur við sínum ofta sera beinraknu viðmerkingum. Enn er hæddarpunktið í eini hvørjari veitslu, tá hon heldur røðu, sum hon so hegnisliga dugir at flyta fram. Fyri okkum er hon miðdepilin í familjuni, og hugnaligt er at vitja í heimið, har hon býr einsamøll og enn klárar seg væl. Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við degnum og alt gott framyvir.

Børnini

Andlát

8. juli
Jóan Jákup Jacobsen, Sørv., 44 ár
Gunnar Christiansen, Skála, 56 ár
Ernst Mortensen, ættaður av Tvøroyri, 67 ár.
Eivind Eliasen, Mikladalur, 76 ár.
Nicodemus Hentze, vanliga nevndur Demmus, Sandur, 81 ár.
Herlo Olsen, Vágur, 67 ár.

9.juli
Simona Mohr úr Vági, 81 ár.
Absalon Absalonsen, van.nevndur Absalon á Biskopstø, 75 ár.

10. juli
Gunnvør Mogensen, fødd Nolsøe, úr Vági, 74 ár.
Gunnar Olufsen, ættaður úr Funningi, búsitandi í Keypmannahavn, 93 ár.

12. juli
Paula Olsen, úr Havn, 85 ár.
Jóhan á Plógv, Sandavágur, 82 ár.
Magnhild Maria Geyti, úr Kollafirði, 92 ár.
Líttla Anna, dóttir Asbjørn og Vígdis Johannesen.

13. juli
Edmunda Stenberg fødd Nicolajsen í Skopun, 76 ár.
Arne Samuelsen í Klaksvík, 72 ár.

14. juli
Kerta Magnussen í Trongisvági, 80 ár.
Elsubeth Maria Holm Jacobsen, Ebbumia, Havn, 89 ár

NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

10 nýggir exam.art'ar

Frá vinstru: Margretha Knudsen, Tórshavn, Per Jacobsen, Klaksvík, Ásleyg Johannesen, Húsavík, Joan Olsen, Søldarfirði, Mortan Ólason Vang, Tórshavn, Katrin Reinert, Tórshavn, Victoria Absalonsen, Viðareiði, Eyðfinn Fjallsbak, Miðvágur, Kára Heinesen, Tórshavn, Hedvig Westerlund-Kapnas vantar á myndini

Mynd: Rúna Sivertsen

Hósdagin fingu 10 studentar exam.art.-próvg á Føroyamálsdeildini. Tey hava lokið 2 ára útbúgving í norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum.

Fyrstu exam.art.-próvgini vórðu útskrivað í 1979, og nú verður seinasti árgangurin útskrivaður, tí nýggj kunngerð er komin fyri útbúgvingar á Fróðskaparsetrinum.

Exam.art. fellur nú burtur, og í heyst fara nýggir studentar undir B.A.-útbúgving í føroyskum, sum er 2 ára støðisnám umframt 1 B.A.-ár. Tó hava tey, sum eru í holt við exam.art.-nám, høvi til at gera tað liðugt.

Í røðu síni segði Malan Marnasdóttir, rektari, millum annað:

- Nú kunnu tit prýða tykkum við heitinum exam.art. Tað er ein latínsk stytting fyri examen artium, ið merkir eitt prógv í fríu listunum, tað eru hugvísindini. Latín var fyri langari tíð síðani felags mál hjá vísindafólkum, tí eru styttingar fyri prógv og gradir ofta latín.

- Eg vil fegin ynskja foreldrum tykkara, makum og børnum hjartaliga tillukku við avriki tykkara, tí uttan teirra hjálp og stuðul hevði tað óiva ikki borið so væl til, segði Malan at enda í røðu sínari.

Bjarti á Sjómansheiminum 75 ár



Í gjár fylti Bjarti Petersen í Klaksvík 75 ár. Hann er best kendur undir navninum, Bjarti á Sjómansheiminum.

Foreldur hansara vóru Maria og Alfred Petersen. Í 1957 giftist hann við Jónu Sigurðsson og eiga tey trý børn, Alfred, Jógvan og Mariu. Abbabørnini eru 10 tali.

Bjarti var fyrsti fyristøðumaður á Sjómansheiminum, tá tað læt upp í 1961. Saman við konu síni, hevur hann rikið virksemi har øll árini, seinastu árini saman við soninum, Jógvan.

Í 1947 fór hann sín fyrsta túr til skips. Seinni fór hann á stýrimannsskúla. Hann sigldi eisini við Skálabergi og Sjúrðarbergi, og eitt skifti var hann stýrimaður við Karin K.

Bjarti er álitismaður burturav. Umframt fleiri nevndarsessir, sat hann eisini tvær setur í býráðnum (1974-1982). Heili 24 ár sat hann í stýrinum hjá samkomuni, Emmaus.

Sitt starv sum fyristøðumaður á Sjómansheiminum hevur Bjarti rókt við størsta nærlagni. Hann hevur dugað serstakliga væl at fáa fólk at kenna seg vælkomin, og veitslurnar á Sjómansheiminum eru altíð væleydnaðar undir hansara leiðslu.

Bjarti brennir fyri missiónsarbeiðnum. Hansara gudstrúgv røkkur eisini til teirra, ið liggja lágt, og mong eru tey, ið hava kent fløvandi hondina hjá Bjarta.

Bjarta verður ynskt hjartaliga tillukku og Harrans signing framyvir.

Signar settur sum skúlastjóri í Vestmanna

Landsstýrismaðurin í mentamálum hevur fyribilssett Signar á Brúnni, lærara í Fuglafirði, sum skúlastjóra í Vestmanna skúla frá 1. august til 8. oktober í ár

TÍÐINDASKRIV



Signar á Brúnni er 59 ára gamal. Hann starvast til dagligt sum lærari í Fuglafjarðar skúla og hevur verið lærari síðani 1969. Hann hevur áður átikið sær leiðarastørv í fólkaskúlanum, tá myndugleikarnir hava heitt á hann.

Skúlastjórin, ið hevur verið tvey tey seinastu árini, Símin Simonsen, hevur søkt um lærarastarv aftur við skúlan frá 1. august í ár.

Varaskúlastjórin, Jóannes Fonsdal, hevur søkt um at fara frá vegna aldur frá 1. august í ár.

Mentamálaráðið fer at lýsa ósettu leiðarastørvini í Vestmanna leys um miðjan august, og roknað verður við, at størvini kunnu verða sett soleiðis, at nýggja leiðslan kann taka við eftir heystfrítíðina í ár.

Dagurin

17. juli. Aleksius, deyður umleið ár 430. Hann var sonur ein rómverskan senator, men fór ungur heimanífrá og livdi sum biddari og kristin prædikumaður í 17 ár. Hann kom heim aftur og livdi onnur 17 ár sum biddari fyri durunum hjá pápa sínum. Eftir deyðan varð hann skírdur halgimenni. Hann liggur jarðaður undir Pæturskirkjuni. Navnið er ein stytting av Alexandros, ið merkir *verndarmaður*.

18. juli. Arnolphus, deyður ár 641. Hann var biskupur í Metz. Eftir deyða hansara henda mong undurverk við grøv hansara, og hann varð skírdur halgimenni.

19. juli. Justa, deyð umleið ár 300. Halgisøgan sigur, at hon og systirin Rufina, beindu fyri skurðgudamyndini Salambo í Sevilla Spaniu. Tær vórðu báðar píndar og tiknar av døgum. Navnið merkir *tann rættvísa*.

†

Kunngjørt verður, at kæra kona, mamma, vermamma og omma okkara

Beinta Biskopstø

andaðist í heiminum hósdagin 15. juli
68 ára gomul.

Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum
í dag, leygardagin kl. 18.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni
sunnudagin kl. 14.00.

Vegna tey avvarðandi

Sverri

Marjun, Rakul, Jógvan og Óluva

Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi í stóru sorg okkara, tá elskaði maður mín og babba okkara

Kim F. Jacobsen
Klaksvík

so brádliga doyði og varð jarðaður.

Takk fyri troystarrík orð heima hjá okkum,
í kapellinum og í Betesda.
Takk fyri blómur, kransar, brøv, uppringingar,
vitjanir og peningagávur.
Takk til øll, sum hjálptu til við jarðarferðini,
og takk til øll, sum fylgdu honum til hansara
seinasta hvíldarstað her á fold.

Vegna tey avvarðandi

Gunnleyg,

Rói, Bergur, Kristina og Teitur